## Real og Ronaldo trýsta

Umstøðurnar vóru torførar fyri høvðusstaðarliðið, tí heimavøllurin hjá Xerez minti mest um eina eplaveltu. Real Madrid royndi sum frægast at spæla bóltin, men umstøðurnar loyvdi tí ikki. Í seinni hálvleiki fekk Real Madrid so hol á. Fyrrverandi Liverpool leikararin Álvaro Arbeloa var komin framvið og legði gestirnar á odda. Síðani tóku Cristiano Ronaldo og Kaka yvir. Tvær ferðir legði Kaka upp til Ronaldo, sum skoraði til 2-0 og 3-0. Stutt eftir 1-0 málið skifti Real Madrid Raul inn. Hann hevur í seinastuni verið settur í samband við New York Red bull. Real Madrid er nú tvey stig aftanfyri Barcelona.



## Barcelona tapti í Madrid

Barcelona tapti fyri fyrstu ferð í La Liga hetta kappingarárið í kvøld. Atlético Madrid vann dystin 2-1. Dysturin var bara fýra minuttir gamal, tá Atlético Madrid legði seg á odda. Teir fangaðu ein bólt á miðjuni og fóru í mótálop. Bólturin endaði hjá Diego Forlán, sum skoraði trygt. Um miðjan fyrra hálvleik økti fyrrverandi Barcelona spælararin, Simao, uppá beinleiðis fríspark. Zlatan Ibrahimovic minkaði um munin áðrenn hálvleik. Fleiri mál komu ikki og sostatt er fyrsta tapið hjá Barcelona í La Liga í ár veruleiki. Barcelona liggur fremst við 55 stigum, meðan Real Marid er nummar tvey við 53 stigum. Atlético Madrid liggur nummar ellivu við 27 stigum.

### ÍF-Mjølnir 0-3 (17-25, 22-25, 11-25):

# Mjølnir aftur á odda

**Klaksvíkingar tóku væntaða sigurin á fuglfirðingum, men vóru verri enn so sannførandi í teimum báðum fyrstu settunum**




Hilmar Jan Hansen



Fuglfirðingar fingu bitið eitt sindur frá sær í gjár, men kortini kundu teir ikki forða fyri, at Mjølnir fekk væntaða sigurin á Kambsdali

Mynd: Oliver Joensen/Norðlýsið

Mjølnir og SÍ, ið longu hava tryggjað sær pláss í FM-finalunum í Eik-liguni hjá monnum, liggja mestsum lið um lið á stigatalvuni. Við sínum sigri mikukvøldið var SÍ farið framum, men tá Mjølnir í gjár vann ÍF á Kambsdali, merkti tað, at Mjølnir aftur gjørdist oddaliðið.

Hóast bæði liðini longu eru í finalunum, er ikki líkamikið, hvat teirra endar sum nummar eitt í sjálvari landskappingini, tí oddasessurin gevur rætt til heimavøll í einum møguligum triðja finaludysti, skuldu liðini vunnuð hvør sína av teimum báðum fyrstu, sum verða spældar á uttanveltaðum vølli.

Klaksvíkingar, ið til endaspurtin í kappingini hava styrkt sær liðið við sørvinginum, Jón Nielsen, vóru favorittar at vinna á ÍF í gjár, og tað eydnaðist eisini, tí Mjølnir vann dystin 3-0. Men ÍF stríddist væl og var væl við í teimum báðum fyrstu settunum, so onkra løtuna kom eitt sindur av spenningi í.

Í fyrsta setti slapp Mjølnir nokk so tíðliga avstað, millum annað ÍF-liðið gjørdi í so nógvar feilir og ikki av álvara fekk fatur í klaksvíkingum. Men ímóti endanum á hesum settinum sást, at ÍF ikki ætlaði at geva seg uttan svørðslag, og tað kom enn meira til sjóndar í øðrum setti.

Tá var spælið nógv javnari, men ÍF kom betur frá byrjanini og førdi nokk so langt upp, áðrenn Mjølnir fekk fatur í. Tá so avgerandi bóltarnir skuldu spælast, vísti tað seg enn eina ferð at vera trupult hjá ÍF at sláa ígjøgnum, og í staðin slapp Mjølnir at yvirhála í evstu løtu og taka settið.

Hetta kostaði hjá fuglfirðingum, sum í triðja setti fullkomuliga góvu upp, so Mjølnir fekk lætt spæl og smurdi ÍF av. Eitt úrslit, ið samsvarar við stigatalvuna, men eisini enn ein dystur, har ÍF í løtum var væl við, men kortini hvørki fekk sett ella stig.

### ÍF-TB 0-3 (18-25, 24-26, 14-25):

# TB mótstøðu frá ÍF

**Hóast TB var greiður favorittur undan dystinum á Kambsdali í gjár, megnaði ÍF at geva góða mótstøðu – serliga í øðrum setti, tá tveir settbóltar máttu til**




Hilmar Jan Hansen

Enn er TB besta boðið upp á tað liðið, ið væntandi skal møta SÍ í FM-finalunum í Eik-liguni hjá kvinnum. Men tað var ikki alla tíðina, at tað sást so væl, tá TB í gjár var á Kambsdali, har ÍF tók ímóti. Serliga tey bæði fyrru settini í 3-0 sigrinum hevði TB ilt við at fáa spælið at koyra, og í øðrum setti stóð á ímóti endanum.

Frá byrjan vóru móttøkurnar hjá TB ikki í tí klassanum, ið væntast kann av einum liði, ið er beinleiðis við í kappingini um at gerast føroyameistari. Av tí sama gjørdist spæli hjá tvørakvinnum heldur ikki tað besta í fyrsta setti.

ÍF royndi eftir førimuni at leypa á, og hóast álopsspælið hjá heimaliðnum fyri tað nógva var heldur eintáttað, so riggaði tað væl í løtum. Hinvegin hevði ÍF nógvar góðar servur, ið skakaðu TB, sum serliga í øðrum setti hevði trupult við at taka tær.

### ÍF gott servutrýst

Sá TB ivasamt út í fyrsta setti, so var lítið mætari í øðrum, tí framvegis var tað ikki nógv, ið gestirnir fingu at rigga. Móttøkurnar vóru framvegis vánaligar, eins og TB slett ikki megnaði at leggja servutrýst á ÍF, ið ov nógvir servufeilir blivu gjørdir.

Av tí sama fingu tvørakvinnur heldur einki álop í gongd. Kortini var TB fyri tað nógva eini tvey stig frammanfyri allan vegin, men ímóti endanum á settinum var um reppið, at ÍF fekk tikið TB aftur. Tá støðan var 23-24, hevði TB ein av sínum servufeilum, so ÍF kom upp á javnt 24-24, men tá alt so skuldi avgerast, var TB drúgvari og vann settið.

Sum tað so ofta er í slíkum dystum, gekk øðrvísi í triðja setti, tí tá fekk TB langt um leingi víst, hví liðið liggur heilt har frammi. Beinanvegin fór TB avstað, meðan ÍF slett ikki kom í gongd, so her gjørdist hóast alt eingin sum helst ivi um vinnaran.

Sigurin merkir fyri TB, at liðið framvegis liggur best fyri av teimum næstbestu, tá tað snýr seg um eitt finalupláss. Eisini hevur TB spælt ein dyst minni enn Mjølnir, ið er argasti kappingarneytin nú, so ikki vantar nógv í, at tvørakvinnur, sum í fjør vóru aftastar, í ár sleppa at spæla um gullið.